# Ræðumyndir, populisma og misskiltur næstrakærleiki

HALLUR GILSTÓN THORSTEINSSON



Tað snýr seg um virðing fyri tí einstaka og trygd fyri, at eisini minnilutar hava somu rættindi sum meirilutin. Hetta eru demokratiskar og humanistiskar dygdir. Dygdir, sum eisini eru í trá við kristna siðvenju og barnatrúgv flestu føroyinga.

Tað er ørkymlandi at síggja, hvussu stórur partur av 'Nej-sigarunum' argumentarar í málinum um broyting av §266B í revsilógini. Ræðumyndirnar fáa ongan enda. Tað er eingin logiskur samanhangur millum eina broyting av antidiskriminatiónslógini og so tær ræðumyndir, sum framførdar verða. "Siga vit ja til at verja tey samkyndu í revsilóguni, so viðførur hetta, at næsta stigið verður ja til skrásett paralag, adoptións- og inseminatiónsrættindi hjá samkyndum". Hetta hevur verði sagt fleiri ferðir í kjakinum. Hetta er ein ræðumynd og eitt postulat.

Eisini hevur verði sagt, at talan er um ein pseudotrupulleika – altso, at broytingin í §266B ikki fer at hava árin, av tí at talan ikki er um ein veruligan trupulleika. Eitt av argumentunum í hesum samanhangi er, at ein broyting av lógini ikki kundi hjálpt samkynda Rasumusi Rasmussen, tá hann varð álopin á einum vertshúsi í septembur. Sjálvt kjakið er eitt týðiligt dømi um, at talan als ikki er um ein pseudo-trupulleika. Tey samkyndu eru blivin diskrimineraði á ljótasta hátt í hesum kjaki. Vit skriva anno 2006, og enn eru fólk, sum fáa seg sjálvan til at samanbera samkynd við perverteraðar og kriminellar bólkar sosum td. fólk, ið líða av kleptomani, pyromani og pedofili. Um mín eginleiki sum reyðhærdur hevði viðført, at eg í almenninginum skuldi bólkast millum fólk, ið td. hava kynsligan áhuga í børnum, hevði eg kent meg særdan og niðurgjørdan. Hevði eg verið samkyndur, hevði eg kent meg diskrimineraðan í hesum kjaki. Altso er sjálvt orðavalið í kjakinum marginaliserandi, niðurgerandi og diskriminerandi – og harvið eitt tað besta dømi um, at okkum tørvar broyting í §266B.

Tað var skelkandi at lesa eina samrøðu við Óla Breckmann í danska tíðindablaðnum Politiken í farnu viku. Her sá mann besta dømi um, hvussu vandamikil ein cocktail av ræðumyndum, populismu og konservativum hugsjónum í veruleikanum er. Uttan kritiskan sans samantongdi Óli Breckmann betongkommunismuna, nazistiska rákið í 1930'unum, náttúru- og umhvørvisrørsluna, friðarrørsluna í Suðurafrika og fortalarar fyri rættindum teirra samkyndu. Hetta tilfar koyrdi hann í ein stóran pott og kallaði cocktailin: 'Humanisma'. Hetta er populisma; hetta er júst tann framferðarháttur, sum varð nýttur í uppbygnaðinum av fasistisku stýrunum í Italia og Týsklandi. Mann leggur lítið í søguligu sannroyndirnar, skapar eina svart/hvíta heimsmynd, kryddar við speisemi og eitt sindur av ræðumyndum. At enda pyntar mann cocktailin við einari litfagrari prikkutari butterfly. Liðugt! Soleiðis eiga vit ikki at kjakast í einum modernaðum og demokratiskum samfelagi!

Homoseksualitetur er ikki ein sjúka. Tí kann homoseksualitetur heldur ikki "viðgerast" – hvørki hjá kommunulæknanum, psykiatriska deplinum ella í samkomuhúsinum. Kanska kann homoseksualitetur undirtrykkast við ljótum orðum, diskriminatión og hóttanum um helviti, men so útinna vit eisini harðskap mótvegis tí einstaka og skerja hansara ella hennara rætt til at liva tað lív, sum júst er hansara ella hennara.

Vit eiga ístaðin at stuðla tí einstaka – eisini sjálvt um hann ella hon eru samkynd. Vit eiga ístaðin at siga: Føroyar eru eitt land, har vit virða hvørt annað og hjálpa hvørjum øðrum.

# Ein landasvíkjari og annar

NAPOLION MAGNUSSEN
Miðvágur

Henda grein er um 266b, so um onkur hevur hoyrt nóg nógv um tað møsnið skal tú ikki lesa víðari, Eg helt sjálvur, at eg hevði langt síðani fingið nokk.

Men tá ið eitt av okkara umboðum á norðurlandaráðsfundi ger okkum fyri skommum við at geva øllum tað fatan at vit eru av somu fatan sum hann, ella tá ið onkrir av okkara tingmonnum í donskum fjølmiðlum siga tað sama, umfram at koma við idiotiskum, átrúnaligum grundgevingum og rasistiskum viðmerkingum, tá er mær ovboðið.

Eri júst komin av Danmørk eftir eina sera áhugaverda ferð sum, á meira enn ein hátt, vísti hvussu aftarlaga vit eru. Endamáli við ferðini var at fáa meira og betri vitan um fólkaskúlar, hvar eru onnur á veg, hvar eru vit í mun til onnur. Hetta koma tit heilt víst at hoyra meira til seinni, eingin ivi um tað.

Men hevði tað ikki verið fyri eina hending har niðuri, hevði eg ikki lagt afturat bálinum. Og tí at føroyingar, sum ikki eina ferð, skula uppfinna tann djúpa tallerkin umaftur.

Tá ið vit komu inn um gáttina á einum skúla, møtti eg einum Søren, sum sjálvandi ikki kundi bara sær: "Nå, der har vi færingene. I må sandelig passe på jer her, for vi er allesammen bøsser og lesbiske! Vi så nemli´ alle sammen den store klaptorsk i butterfly på TV-avisen i går aftes. Det er sgu´ synd at de bruger vor bedste sendetid til sådan en tosse".

Um nakar hevur kallað Høgna Hoydal fyri landasvíkjara av tingsins røðarapalli fyri at spyrja, líka mikið um tað so eru leiðandi spurningar um okkara meinig um herskyldu ella ikki, so eru onkrir av okkara landsins kosnu monnum ikki mætari. Høgni ger ikki annað enn tað, hann eigur at gera; at verða kritiskur, ikki endiliga negativur, men kritiskur. Tað hava andstøðufólk altíð verið, sjálvt um Høgna´sa máti kanska virkar meira ágangandi, tí hann drívur meira á enn onnur.

Eg royndi at greiða hesum góða Søren frá, at eg hevði tað fatan at hesi, sum góðu øllum heiminum eina so ljóta mynd av føroyingum og Føroyum als ikki vóru í meiriluta. Teir vóru at rokna sum Hizbolla og aðrir ekstremistar sum hægst fingu 10% við sær av fjøldini. "Nå, hvorfor er der så mange ekstremister i Lagtinget", kom tá frá Søren. "De albuer sig frem på en eller anden mærkelig vis", var mítt besta boð.

Sum tað sær út, so hava vit nakrar av heimsins vánaligastu politikarum at stýra okkara landi. Tíðin verður brúkt til alt annað enn tað, framskygdir politikarar eiga at brúka hana til. Summir sleppa at seta dagsskránna við sínum smámanna hugsjónum, ímeðan ein við góðum politikki verða niðurgjørdur og burturtagdur. Jante var og er føroyingur, eingin ivi um tað!

Míni ráð til tykkum, allar sum ein; hyggi í ein spegil og síggi fyri tykkum tykkara største politiska mótstøðufólk. Sjálvt um tit ikki vilja tað eiga tit at semjast á ein ella annan hátt fyri at fáa skilagóðar loysnir, annars eru tit óegnaður. Tí tað eru tveir mátar at verða mintur søguliga uppá; antin at finna skilagóðar og haldarar loysnir, ella at standa sum eitt tvørball sum altíð lá á tvørs, sum oftast bara fyri at verða tað. Og teimum seinnu eru tað ivaleyst av sum er.

Eg eri farin at hugsa um tað ikki er upp á tíðina við einum tvíbýttum løgtingið millum menn og kvinnur við tí eini orsøk; at fáa skil á hasum sirkusinum!

Og til øll tykkum, sum taka hesa grein sum eitt fornermilsi; stovnið tykkara egna flokk so vit onnur altíð vita hvar vit hava tykkum, heldur enn at forpesta allar flokkar.

*"Tey einastu, sum møguliga hava deyðadóm uppibornan, eru tey, sum døma onnur til deyða her á fold ella í ævinleikanum"*
sitat: NM

# Viðmerking til Dan R. Petersen

JAN HØJGAARD



Tað er gott, at Dan R. Petersen hevur verið við til, at bera landsins byrðar, nú í eitt 3 ára skeið.

Til síðsta løktingsval fekk eg 21 atkvøður, men Dan sigur seg hava fingið 327. Tað eru fleiri orsøkir til tað. Eitt er tað, at Dan var kendur sum løgtingsmaður, meðan eg var eitt óskriva blað, ein vanligur fiskimaður. Annað er, at Dan førdi eitt rættiliga hart valstríð, við nógvari skriving o.s.fr., meðan eg ikki hevði umstøður til tað. Triðja er, at Dan og eg, høvdu hvør sína dagsskrá, sum viku rættiliga langt frá hvørja aðrari. Dan førdi onki fram í valstríðnum, sum var til frama fyri fiskimannin. Eg skrivaði 3 stuttar greinar, har ein av greinunum var eitt aftursvar. Hinar báðar vóru um, okkara veikastu borgarar og, ja sjálvandi, um korini hjá fiskimonnum. Eg var eisini í ÚF og segði mína hjartans meining um kor fiskimanna, tí tað liggur mær tungt á herðunum. Eg meti, at ein atkvøða til Dan, er at fara frá ringum til verri.

Havi altíð havt hjarta fyri fiskimonnum, eg kann ikki annað. Tí var eg rættiliga firtin til síðsta løgtingsval, um tann ágang, sum var førdur móti okkum.

Endurgevi eina stutta grein, sum var skrivað tá - Eg hoyrdi í einari útvarps-framløgu, at tjóðveldisflokkurin lýsti seg sum fiskimanna og verkaflokk burturav. Tað mundu vera fleiri við mær, ið bluvu illa við av at hoyra slíka propaganda. Eg havi veri fiskimaður í 20 ár, og tað tíðina hava vit fiskimenn verðið illa viðfarnir av teimum,ið hava tilknýtið til handa flokkin. Tey nógvu árini hava tey rópt upp um fiskimenn, ið hava tað so gott. Tey hava neyvan verið við til, at sæð sundursorðaðar fiskimenn, ið hava tænt føðilandinum.

Anita á Fríriksmørk hevur í løgtinginum lagt eftir sjómans-frádráttinum og harvið ti hart arbeiðandi fiskimanninum. Eisini hevur formaðurin í Búskapar-ráðnum lagt eftir fiskimanninum. Tað er ikki so sum tit siga. Eg vil heita á tykkum um at lata hampafólk fáa frið og ikki sáða slíka gift út. fiskimaðurin er tann føroyski stoltleikin og er við til gjalda teir nógvu barsilpenganar, ið millum annað, Anita á Fríðriksmørk hevur fingið. Man orðatakið, "løn skálkinum gott, hann lønir tær aftur við háð og spott," ikki rigga her? Tað var Tjóðveldisflokkurin, ið pressaði tað ígjøgnum, at arbeiðsfólk, fiskimenn, handverkarar og onnur á privata arbeiðsmarknaðinum ikki fingu sjúkrapengar úr landskassanum frá fyrsta degi. –

Soleiðis eigur tað at ljóða frá einum fiskimannahjarta, altíð klárur at verja borg, og ikki bara tíð, at ein vil sleppa til róðrið í FF.

Nú Dan reypar um 7 skip og 2 sóknarformenn, kann eg siga, at eg havi 10 skip og 3 sóknarformenn, ið hava stilla meg upp. Eg kundi lættliga fingið fleiri, at skoti meg upp, men einum nýtist bara 5 stillarar.

Fiskimenn vita, at nú er tað álvara, og tí fara teir ikki at velja ein breyðpolittikara, og teir ivast ikki í, hvør hevur hjarta fyri teimum.

**PS.** Dan eg hoyri, at tú nýtir tann gamla sjómannamátan, at enda ein samtalu millum skip. Tú og Óli hóska væl saman sum søgufrøðingar. Vónandi geva tit okkurt ritverk út nakað skjótt. Eg eri enn fiskimaður, og tað meti eg sum ein stóran heiður.

Sera blíðar heilsan, frá einum fyrrverandi næmingi, til sín fyrrverandi lærara

# Flutningur av pensionistum við Strandferðsluskipunum

JÓGVAN ELIS DANIELSEN

**Vit eru pensionistar, men eru vit nú tað?**

Eg eri ein av teimum, sum havi glett meg nógv til nýggja Smyril. Sigast má, at tað er eitt gott skip, vit hava fingið. Latum okkum tí ganga væl um skipi!

Men kortini er tað eitt, sum pensionistur, sum undrar meg. Tað ber til at fáa eina bilett fyri ein rímuligan pening, men hevur tú bil, er tú knappliga ikki pensionistur longur, men má gjalda fullan prís!!

Tíbetur liva vit í einum landi, har teir flestu pensionistarnir hava bil. Men at vit liva í yvirflóð, við teirru lítlu pensiónini vit fáa, er synd at siga.

Tað vildi tí glett meg nógv, um Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður, ella onkur, sum hevur ábyrgdina av hesum, vildi greitt mær frá, um henda mannamun, sum verður gjørdur á landsins pensionistum.

**Fleiri viðmerkingar eru á síðu 35 og 36**